

*Gerda saman við mammu sínu Andreu*

Erik lærdi til skómakara hjá pápa sínum Lars Larsen. Sum vanligt á skómakaraverkstøðum kom nógv fólk inn á gólvið, og nógv varð prátað. Her kom Erik at fáa innlit í "elendigheitina í samfelagnum", og hetta fekk hann at fara uppí verkamannarørsluna.

Tað var sum sagt nógv samband millum Fylking og danska javnaðarflokkin við Thorvald Stauning á odda. Sigast kann eisini, at danski javnaðarflokkurin stuðlaði eisini væl og virðiliga. Hann hevði jú stjórnarvaldið í Danamark, og tað sást eisini aftur. Men onkuntíð stóð nógv á.

Í 1934 sendi Fylking Erik Larsen, sum tá var formaður í felagnum, til Danmarkar fyri at yvirtala stjórnina at stuðla kolavinnuni, sum hevði so stóran týdning á Tvøroyri. Ynskið var at fáa virksemið víðkað, so tað kundi útvega enn fleiri tiltrongd arbeiðspláss.

Erik hittir eisini á ferðini allar "topparnar" í danska javnaðarflokkinum. Hann hittir eisini Stauning.

Men Stauning, sum var í ringum skørum hendan dagin, deildi Erik og brikslaði Fylking tað stóra tap, sum danski staturin hevði havt av Ívirkinum og Ísvirkisbátunum, sum hevði kostað danska statinum 400.000 kr.

Men Erik var nú ikki lættur at syfta, so Stauning fekk av at vita. Erik segði honum bart út, at tvøroyrafólk so sanniliga eisini høvdu borið sín part av tapinum, tilsamans 40.000. Hetta var eingin lítil upphædd samanborið við tað tap, danski skattgjaldarin hevði havt og so slættis ikki, tá hugsað verður um búskaparligu viðurskiftini í Føroyum sum heild og serstakliga á Tvøroyri.

Stauning var sum kunnugt ikki mjúkur at strúka, og til endans gjørdust teir báðir so heitir, at blaðmaðurin Poul Sabro, sum skipaði fyri ferðini hjá Eriki, helt tað vera neyðugt at leggja uppí.

Hann minti Stauning á, at Erik Larsen stóð her ikki bert sum partamaður Staunings men eisini sum ein av fremstu slóðbrótarum fyri arbeiðara- og javnaðarrrørsluna í Føroyum. Eisini minti Sabro Stauning á, at Erik var komin alla ta longu leið at søkja stuðul til at bøta um tey syndarligu korini hjá arbeiðarafjøldini í Føroyum, og at hann tí hevði annað uppiborið enn at vera skeldaður út.

Tá sissaðist Stauning og gjørdist so smátt heilt fyrikomandi, og tað sum eftir var av fundinum, fór fram í bestu semju, og Stauning lovaði at stuðla.

## Óført at vaksa upp í Puntabyrgi

Vit búðu inni hjá Jens abba at byrja við, og har eri eg fødd. Pápi hevði innrættað kjallaran til okkum at búgva í saman við einum verkstaði. So fingu vit eitt kamar uppi á loftinum.

Men tá ið eg var fýra ár doyði mamma, Andrea. Tá fluttu eg og systir mín til ommu og abba í Puntabyrgi, Margrethu og Petur Lars Petersen.

Tey vóru verðins bestu menniskju. Omma var framúr, altíð gott tilpas. Hon hevði 14 børn. So fekk hon meg og Petreu systir mína afturat. Hon var bert 1 ára gomul.

Tey áttu tvey børn sum doyði so tíðliga, eitt og fimm ára gomul. Hini komu so til. Men eitt teirra, Emil, gjørdist bert 21 ár.

Emil var ein dagin á floti. Óslætt var í sjónum og báturin rullaði. Byrsan rósaði í bátinum og gekk av. Emil varð so meint raktur, at hann var deyður, táið teir komu til lands. Annars plagdu teir at syngja, tá ið teir komu til lands, men hetta kvøldið var ikki sungið.

Tað var ikki so langt millum tey yngstu av teirra børnum og okkum báðar. Tey áttu sjey gentur og sjey dreingir. Mamma var tann elsta gentan. Men tað vóru tríggir beiggjar, sum vóru eldri. Teir vóru Óli, Sigurd og Alfred og so Emil, sum doyði. Tann yngsti av systkjunm hjá mammu æt Emil, uppkallaður eftir deyða beiggjanum. Hann var bert 10 ár eldri enn eg. So tað var hjá okkum sum at koma í ein stóran systkinaflokk.

Vit høvdu tað virkuliga deiligt í Puntabyrgi. Tað vóru víst ikki nógvir pengar. Vit máttu eisini arbeiða, tá brúk var fyri tí sum við hoygging og annað. Men vit fingu kortini altíð tíð til at spæla.

Vit skóru eisini torv. Eg minnist, at eg saman við systkinabarninum Petur Emil, beiggja Finn í Puntabyrgi, plagdi at fara við abba at skera torv. Vit royndu at gera okkum so skitin sum gjørligt, so vit kundu leypa í ánna aftaná.

Torvið varð lagað upp sum í eini stórari sátu. Torvið stóð niðanfyri húsini. Vit spældu nógv í hoyggjhúsinum, og so svumu vit nógv í sjónum.

## At ganga til Vágs var einki at tosa um

Tá farast skuldi til Vágs, til dømis at spæla hondbólt, plagdu vit at ganga. Eg havi gingið heilt nógv. Eg var ofta sum ung genta í vikuskiftum hjá eini mostir, sum búði í Porkeri. Hetta var ein longri teinur, men tað bakkaðu vit ikki fyri.

Eg minnist einaferð, at eg og Birgit Hestoy fóru til gongu suður eftir oyggj, og tað gjørdist greytasvart í mjørka. Vit vóru júst komnar upp í Skarðið við Øravík. Vit sóu ikki oman á Vatnarygg. So sigur Birgit: "Vit finna aldri vegin." "Tvætl," segði eg, "vit skuldu bara ganga beint omaneftir, og so koma vit til ánna, sum rennur úr vøtnunum og oman til Hovs." Vit komu eisini í øllum góðum til Porkeris.

Tá var eingin vegur. Vit gingu eisini til Fámjins í grind, og eg veit ikki hvussu ofta vit gingu til Hvalbiar, eisini sum skótar. Eisini vóru vit útferð við losjuni til Hvalbiar.

Í dag verður nógv tosa um, at ov lítið verður gjørt fyri tey ungu, so tey keða seg. Vit fingu ikki tíðina at strekkja til. Tað var so nógv at fara til.

Tríggjar ferðir um vikuna fóru vit til hondbólt. Vit vóru í losjuna hvørja viku. So var tað handilsskúlin. Hann kundi takast eftir tveimum árum, tá ið man hevði realprógv.



*Omman Margretha mjólkar kúnni*



*Her nappa tey ull. Gerda situr undir skinninum*

## Abbi mundi farið í luftina

Abbi arbeiddi á bedingini. Hann var í maskinrúminum og tók skipini upp og fekk tey aftur á sjógv.

Einaferð var tað ein av hesum stóru hvalabátunum, sum skuldi lorast oman. Tá sprongdist alt í luftina. Abbin var staddur inni í maskinrúminum, táið óhappið hendi. Eitt stórt tannhjól lá beint við hann, tá ið avtornaði. Stykkini lógu uttanfyri Puntabyrgi og niðan í Heiðabøin. Abbi slapp væl bert við at bróta beinið. Tey trúu, at hann var farin í smildur.

Abbi var einaferð spurdur: "Hvat ger tú við allar teir pengar, tú fortjenar." "Ja, eg seti teir í tólv bankar." Her hugsaði hann um børnini. Tað var ikki so býtt sagt. Tá hevði hann framvegis 12, tí okur báðar vóru við. Tá var tað ikki so nógv, sum tey annars fingu.

Petrea systir giftist til Danmarkar. Hon fekk trý børn. Men fyrst vildi hon síggja heimin, og hon fór til Íslands. Tá var ikki so lætt at ferðast, so hon fór við sluppini Fagranes. Í Íslandi arbeiddi hon eina tíð á eini matstovu. Hon kom heim aftur og fór so til Danmarkar, har hon bleiv verandi.

**Komandi partur**
Í komandi parti fer Gerda at arbeiða hjá AT, Arbejdernes Trawlerdrift, sum gjørdist ein tann størsta fyritøkan í landinum.

Sosialurin